# TILTØK

**Gudstænastur**
**6. sunnudag e. páskir:**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen. Kristiliga sangkórið v/ Hanus Joensen syngur.
***kl. 16.00:*** Konsert v/ Tarira og Vox Academica
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 11.40.
***Bøur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Meinhard Bjartalið, altargangur. ***Í Glyvra prestagjaldi gongur talvan fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.***
***Elduvík:*** kl. 12.00, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00 Hans Eiler Hammer, Norðoyastevnu gudstænasta
***Norðskála:*** kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Saksun:*** kl. 11.00,
***Hvalvík:*** kl. 12.00, altarg., Marjun Bæk
***Hósvík:*** kl. 11.00, latarg., Mogens Tilsted Christensen.
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00, altarg., Uni Næs
***Hattarvíkar kirkja:*** kl. 12.00, Elsa Funding
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen.
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech. ***Talvan gongur fyri ytrimissiónina.***
***Vágur:*** kl. 11.00, Patrick de Neergaard

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Bíbliugransking og barnabíbliutími, kl. 11.00, Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum talar Zacharias Zachariassen um »Himmalferð Jesusar«. Kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka, kl. 12.00 Á tilbiðjunarmøtinum talar Jógvan Z. um »Sannleikar úr Rómbrævinum«. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00.
***á Brekku 3***
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00-18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Týsdagin 30. mai: Fyri tey sum lesa »True Life in God« (Vassula Ryden) »Satt lív í Gudi«. Tvørkirkjulig bønarløta verður síðsta týskvøld í hvørjum mánaði kl. 19.30 í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30. Breyðbróting, barnaansing verður eisini, kl. 18.00 Evangel. møti.

Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin kl. 21.00 Lovsangsfest við Katrinu Høgenhaug.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Katrina Høgenhaug talar, kl. 11.40 Barnagudstænasta.
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjadagin kl. 20.00 Lovsangskonsert.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Eyðun Miðberg talar, kl. 18.00 Evangel. møti, tey ungu skipa fyri møtinum.
www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Útimissiónsmøti v/ Hera og Maluni Kjærbo. Hildur syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron á Argjum**
Leygardagin kl. 19.00 Serligt stuðulstiltak í sambandi við at Santhosham Merupo úr India, sum er ein av leiðaraunum á gentuheiminum Holland Wharf Girl's Hostel, vitjar í Føroyum.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekka. Kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 Møti, Djóni Thomassen talar. Mánadagin 29. mai kl. 20.00 Kvinnuløta.
www.hebron.fo

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 20.00 Teen-Night í Sloans Húsið, Tinghúsvegur 10.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti - Santhosham Merupo úr India luttekur.
www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jákup Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti. Saltið og Barnakórið eru farin í summarfrí, byrjað verður aftur eftir summarferiuna. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og møti kl. 18.00 v/ Bjørn Akselsen úr Sandavági. Hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við Sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við luttøku úr Bø.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting. Sunnudagsskúli fyri øll børn verður í kjallaranum kl. 11.30. Evangel. møti verður kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 møti við Hellu og Regin Olsen.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti, Jón Miðberg talar.
Týsdagin kl. 20.00 Húsmøti hjá Eyðbjørg og Jóhan Hendrik Hansen.
Mikudagin 31. mai kl. 21.00 Útimøti á Torginum.
Fríggjadagin 2. juni byrjar hvítusunnustevnan í ítróttarhøllini undir heitinum »Hvítusunnu tá?/Hvítusunna nú?« við konsert kl. 21.00.

**Kollafjarðar missiónshús**
Vælkomin til hvítusunnustevnuna í døgunum 2.-5. juni.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti við Alice og Martin Højsted. Sunnukvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti í Meinigheitshúsinum á Skála. Ragnar Petersen talar um evni Náðigávur. Eftir møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Niels J. Nielsen, 3. trúargrein. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagsmissiónsvikan í Nesvík**
Fríggjadag 26. mai er Bønarmøti kl. 19.00 og Møti kl. 19.30 við Mogens T. Christensen, presti og Streingjakórið í Vágunum syngur, kl. 22.30 er tiltak fyri ungdómin.
Leygardagin 27. mai er Bønarmøti kl. 19.00 og Møti kl. 19.30 við Regin Høgnesen, trúboðar og Hans Pauli Højgaard syngur.
Sunnudagin 28. mai er Felags sunnudagsskúli kl. 15.00. Bønarmøti kl. 17.30 og Møti kl. 18.00 við Knút Larsen.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti við Justinus Poulsen.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 Møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Jóhan Petur Johannesen, ung úr Oasuni syngja.
Leygardaign kl. 20.00 Møti v/ Tórbjørn Láadal, oasubrøðurnir syngja. Innsavnan til Rumeniuhjálpina.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Johannes og Fríðu Danielsen. Fólk úr Blákrosscaféini luttaka. Innsavnan til húsið.

**Missiónshúsið, Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við bíbliubólkinum hjá kvinnunum og kl. 21.00 Ungdómsmøti við bíbliubólkinum hjá monnunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið hevur Ekklesia sangløtu í Vágstúni kl. 22.00. Sunnukvøldið einki møti.

**Emmaus, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti við Ole Andersen, aðalskrivara í »Ordet & Israel«: »Svørðið í húsi Dávids«.
Leygardagin kl. 9.30 Morgundrekka. Kl. 10.00 Fyrilestur við Ole Andersen, aðalskrivara í »Ordet & Israel«: »At boða út frá GT nú á døgum«. Kl. 11.00 Tíðindi úr Ísrael.
Sunnudagin kl. 18.00-20.00 Bíbliuundirvísing við Ole Andersen, aðalskrivara í »Ordet & Israel«: »Ezekiel 36, 16-37, 14«.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við sunnudagsskúla. Poul Nicolai Steinberg og Dávid Mørkøre tala. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 22.00 Opið hús.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti. Kl. 00.30 Musikkcafé.
Sunnudagin kl. 15.00 Barnasangcafé, barnakórið luttekur. Kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Kristian Fríðrik Olsen. Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið verður ungdómsmøti við luttøku við ungdómi úr Leirvík.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jógvan Højgaard, trúb. sangkórið syngur.

**Samkoman í Bethel**
Samfelagsmøtir í Vági á Hvítusunnu 2006.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti í Bethel.
Leygardagin kl. 10.00 Uppbyggingarmøti í Bethel
Í Ítróttarhøllini á Eiðinum:
kl. 20.00 Evangeliskt møti
1.Hvítusunnudag kl. 10.00 Breyðbróting
kl. 16.00 Uppbyggingarmøti Náttúrði
kl. 19.00 Evangeliskt møti
2. Hvítusunnudag kl. 10.00 Uppbyggingarmøti
kl. 15.00 Uppbyggingarmøti
kl. 20.00 Evangeliskt møti í Bethel. Sangkór luttekur
Opið hús verður í Bethel: Leygarkvøldið og 1. Hvítusunnudag kl. 22.30
Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Møti verður sunnudagin kl. 18.00, Talarar: Malan Hentze og Signheðin Olsen.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Eingrím Holm talar. Øll eru vælkomin.

**Sion, Vágur**
Bíbliuundirvísing við Pola Jacobsen um Job bók, verður leygardagin kl. 20.00 og sunnudagin kl. 11.00 og 18.00.

**Frá Aglow & YWAM í Suðuroy**
Hesi møti verða í Fylking á Tvøroyri 2.-4. juni 2006 við Elisabeth Sýre.
Fríggjakvøldið 2. juni kl. 21.00.
Leygardagin 3. juni kl. 11.00, 15.00 og 20.00.
Sunnudagin 4. juni kl. 11.00 og 17.00. Møguleiki er at eta døgurða og nátturða leygardagin og sunnudagin, við at tilmelda seg hjá Maluni Hentze á tlf. 370538. Kostnaðurin fyri allar máltíðirnar er 250 kr. Møtini eru bæði fyri kvinnur og menn.

**Ørkin, Reykjavík**
Seinasta samkoma fyri summarið verður nú sunnudagin 28. mai kl. 20.30. Kórið í Fríðrikskirkjuni á Toftum syngur, prestur Martin Restorff Jaocbsen og fyrrverandi tingmaðurin Jógvan Ingvard Olsen hava orðið. Øll eru hjartaliga vælkomin. Kaffi og køkur aftaná.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
**Sunnudagin 28. mai** verður farið niðan á Slættaratind. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er miðaltungur. Gingið verður uml. 4 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 29. mai***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobb o.o spøl
kl. 14.00-17.00 ***Nøvn á gamlar myndir,*** Birgar Johannesen.

***Vitja vakstrarhúsið Dáan í Sandavági 31. mai. Úr Steinatúni kl. 13.00. Aftur í Havn kl. 17.00. Kostnaður 80,- Gjaldast 29. mai.***
***Týsdagin 30. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 ***Alternativ íbúðarbygging í Tórshavnar kommunu***. Heðin Mortensen borgarstjóri
***Mikudagin 31. mai***
kl. 10-12.00 Handverk. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 12.00 Vit eta egnan matpakka
Tilhaldið stongt frá kl. 13.00. Vitja vakstrarhúsið Dáan í Sandavági: Úr Steinatúni kl. 13.00 aftur í Havn kl. 17.00.
***Hósdagin 1. juni***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát - Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 2. juni***
Mentanarnáttin - Húsið verður opið fyri almenninginum. Drekkamunnur og køka verður at fáa í Tilhaldinum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 29. mai***
Fimleikur
***Týsdagin 30. mai***
Opið hús
***Mikudagin 31. mai***
Boccia
***Hósdagin 1. juni***
Opið hús
***Fríggjadagin 2. juni***
Opið hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 29. mai***
Telduprát við G. Bjartalíð
***Mikudagin 31. mai***
Um viðrar fara vit gongutúr oman á sand og hava drekka við okkum.

**Dagtilhaldið á Strondum**
***verður opið týsdag og hósdag kl. 15.00-18.00.***

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*